Árni Skaale
Bárður á Lakjuni
Beinir Johannesen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jørgen Niclasen
vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(Hægri botnfrádrátt í kommunuskattinum)

§ 1

Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, verður í § 46, stk. 1 aftaná 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:

"Bygda(r)ráðini kunnu harumframt sjálvi í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári áseta, at eingin kommunuskattur verður álíknaður skattskyldugu inntøkuni frá kr. 30.000 og upp til og við í mesta lagi kr. 65.000."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Borgarar gjalda í høvuðsheitum tvey sløg av skatti; landsskatt og kommunuskatt.

Landsskatturin verður ásettur av Løgtinginum og er í krónum tann sami hvørt ár, um landið ikki ger nakra broyting.

Kommunuskattaprosentið verður av bygdaráðnum ásett hvørt ár, men er botnfrádrátturin ásettur at vera 30.000 kr. í løgtingslóg.

Kommunuskatturin er hjá nógvum, serliga lágløntum, tann størri parturin av skattinum, ið tey gjalda. Av tí at botnfrádrátturin er lágur í mun til tann hjá landinum, so verður borgarin harðari skattaður av fyrst vunnu krónunum.

Uppskotið hevur sum endamál, at kommunurnar sjálvar kunnu áseta botnfrádráttin millum 30.000-65.000 kr., eins og tær í dag hava møguleika at áseta skattaprosent, barnafrádrátt v.m.. Bygdaráðini skulu áseta botnfrádráttin í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári.

Tað gevur kommunum størri møguleikar at áseta, hvussu kommunuskatturin skal skipast, og hvussu borgarin verður skattaður.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Uppskotið hevur ta avleiðing, at kommunustýrini fáa møguleikan at áseta sín botnfrádrátt. Tað hevur við sær, at í teimum førum, at botnfrádrátturin verður broyttur, so hevur tað avleiðing fyri tí einstøku kommuna.

Eisini kemur tað at hava umsitingarligar avleiðingar, tá kommunurnar broyta botnfrádrátt, eins og tað hevur við skattaprosenti, barnafrádrátti v.m.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Umframt fasta botnfrádráttin í kommunuskattinum uppá 30.000 kr. fáa kommunurnar heimild sjálvar at áseta botnfrádrátt fyri inntøkur millum 30.000-65.000 kr. Hetta verður gjørt í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 7. mars 2024

Árni Skaale Bárður á Lakjuni Beinir Johannesen

Jørgen Niclasen Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur